

www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 02 - 2012

# Ungdómurin vil arbeiða við olju og gassi

Ungdómurin í Noreg er rættiliga avgjørdur, tá tað kemur til framtíðar vinnumøguleikar teirra. Fýra av tíggju ungdómum ynskja at arbeiða í olju- og gassídnaðinum, sigur kanning, ið Oljeindustriens Landsforening hevur latið gjørt. Gro Brækken er stjóri í Oljeindustriens Landsforening og hon er ógvuliga fegin um úrslitini av kanningini. "Tá fýra av tíggju ungdómum ynskja at arbeiða í olju- og gassídnaðinum, kunnu vit vera bjartskygd. Mongu fundini seinastu tíðina hava helst latið eyguni upp hjá ungdóminum, tí tey síggja fleiri umráðandi og spennandi uppgávur í norsku olju- og gassvinnuni," sigur hon við olf.no. Ein líknandi kanning fyri einum ári síðani vísti, at 32 prosent av ungdómunum, sum eru millum 15 og 19 ár, ynsktu at arbeiða í olju- og gassvinnuni. Í so máta er talan um eina hampiliga framgongd. Nýggja kanningin vísir eisini, at næstan øll tey spurdu 99 prosent halda, at olju- og gassídnaðurin er avgerandi fyri norska búskapin. "Tey meta henda ídnaðin vera umráðandi fyri Noreg, og hava sum heild eina góð mynd av vinnuni. Tað er umráðandi, tá vit hugsa um framtíðina og at fáa fleiri fólk í olju- og gassvinnuna,"sigur Brækken millum annað við olf.no. Men hóast ungdómurin í Noreg er bjartskygdur kring olju- og gassídnaðin og sær stórar møguleikar her, hava tey lítla vitan um, hvørji fak og útbúgvingar krevjast fyri at arbeiða í vinnuni. - Her hevur vinnan ein týðandi lut fyri at kunna ungdómin um, hvussu tey kunnu gerast partur av mest umráðandi vinnuni í Noreg. Við arbeiða støðugt við hesum og tað skal gerast betri. Samstundis mugu myndugleikarnir og útbúgvingarstovnarnir geva sítt íkast og kunna ungdómin, sigur Brækken við olf.no.